Tofta Ítróttarfelag, B68
Stovnað: 21.12.1962
FO-650 Toftir
Tlf. 448068/Fax 449050
**Formaður:** Niclas Davidsen

**Meistarar (3):** 1984, 1985, 1992
**Steypavinnarar:** Ongantíð
**Greipuvinnarar:** Ongantíð
**Í 1. Deild (22 ár):** 1981-
**Í Europa (4):** Meistarakapping 1993/94, Intertoto 1996/97, 2001/02, 2002/03

# B68 vaskar talvuna reina

**Kappingarárið í fjør var eitt stórt vónbrot hjá toftamonnum, ið endaðu á sætta plássi, og tí roynir felagið við egnum kreftum koma aftur á slóðina, ið plagdi at geva felagnum plaseringar í betra endanum**

Hilmar Jan Hansen



*Øssur Hansen er ein av B68 spælarunum við drúgvum royndum frá altjóða fótbólti.*

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað kendist ikki gott á Toftum, tá landskappingin í fjør endaði við, at besta liðið bert fekk eitt sætta pláss. Tey bæði undanfarnu árini fingu spælararnir hjá B68 bronsumerkji, so 2002 gjørdist eitt stórt vónbrot.

Árið byrjaði annars væl, og líka fram móti summarsteðginum var B68 millum tey allarfremstu liðini. Men so kom stígur í, og liðið kom ongantíð so frægt fyri seg, at nakað pláss í toppinum var upp á tal – og tá trý umfør vóru eftir, fekk Frank Skytte eisini sekkin sum venjari.

Havandi í huga, at B68 við trimum meistaraheitum hevur verið eitt av undangongufeløgunum, tá tað hevur rátt um at seta Eysturoynna á fótbóltsliga Føroyakortið, krevst annað úrslit í ár, um toftafólk skulu vera nøgd.

Talvan skal vaskast rein, og nógv bendir eisini á, at tað verður eitt øðrvísi og nógv broytt B68-lið, sum í ár skal syrgja fyri hesum.

## Stór útskifting

Stutt eftir kappingarenda í fjør var greitt, at B68 í ár fór at spæla uttan heilar níggju av teimum, sum fingu spælitíð í 1. deildarliðnum í fjør.

Tað vil siga, at B68 í ár verður uttan John Heri Dam, Arnold Joensen, Fríðin Ziskason, brasilarnar Messias Perreira, Marlon Jorge og Marcello Marcelino, danskararnar Anders Nygaard og Morten Skytte og polska málverjan Michal Kokoszanek.

Sett er út í kortið av nýggjum, og nú verður satsað meira upp á egið tilfeingi, men heilt uttan styrk er liðið tó ikki. Dánial Hansen, sum hevur eina fortíð á Skála og í NSÍ, er komin afturat, og gamli kenningurin Súni Fríði Johannesen tørnar nú aftur út fyri felagið. Einasti útlendingur, ið er komin aftrat, er íslendingurin Albert Sævarsson, sum verjir B68-málið í ár.

Venjarin hetta kappingarárið er eisini ein, toftamenn kenna væl, tí Petur Mohr var venjari hjá B68 í 1994 og 1995, tá úrslitið gjørdist ávikavist eitt fimta pláss og bronsa.

Hjálparvenjarar hjá Peturi verða Ingolf Petersen og Aksel Højgaard, og fara teir tríggir at taka sær av mansliðunum í 1. og 2. deild, umframt av unglingunum hjá B68.

## Landsliðsmenn

Hóast nógv er farið burturav, er kjarnin á B68-liðnum framvegis tann sami, sum hann hevur verið tey seinnu árini, tí har eru Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen við sínum drúgvu landsliðsroyndum, og Súni Fríði Johannesen hevur fyrr staðið fyri stórum parti av málunum hjá B68.

Ungi miðvallarspælarin, Jann Ingi Petersen, sum í vár fekk roynt seg á venjingarleguni hjá landsliðnum, er uttan iva eisini ein spælari, sum í framtíðini fer at fáa størri ábyrgd og uppgávur á liðnum.

At B68 nú roynir seg við fleiri nýggjum spælarum, krevur óivað nakað av tíð og toli, áðrenn tey stóru úrslitini koma aftur til felagið. Men broytingin, ið at síggja til er nokk so stór, kann saktans geva B68 til eitt spennandi lið í ár – serliga um blandingin við royndum og ungum spælarum fæst at rigga.

Í øllum førum man lítið vera at ivast í, at toftafólk flest fegnast um, at fleiri av teirra egnu manna besta liðið, enn umstøður hava verið til undanfarnu árini.

## Leikarahópur

Tølini, sum eru viðmerkt, siga, hvussu nógvar dystir/mál leikarin spældi/gjørdi fyri felagið í 2002, og hvussu nógv (gul-reyð) kort leikarin hevur fingið í sama tíðarskeiði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Albert Sævarsson (ÍSL) | | | Grindavík |
| Mortan Hansen | | | NSÍ |
| Fróði Jensen | | | |
| Alberg Gaardlykke | | | NSÍ |
| **Verja** | | | |
| Oleif Joensen | 13/0 (1-0) | | |
| Mannbjørn Nesá | 1/0 (0-0) | | |
| Hans Fróði Hansen | 17/2 (2-1) | 23-1 | HB |
| Dánial Hansen | 12/1 (0-0) | | Skála |
| Gestur Lómstein | | | |
| Arni Højgaard | | | |
| Jákup Djurhuus | | | |
| Jan Joensen | | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Fróði Benjaminsen | 16/2 (4-0) | 18/0 | |
| Øssur Hansen | 18/11 (2-0) | 51/2 | |
| Bogi Petersen | 14/0 (2-0) | | |
| Jann Ingi Petersen | 17/0 (1-0) | | |
| Kristian Poulsen | | | NSÍ |
| Jóhan Dávur Højgaard | | | |
| Alex A. Troels | | | |
| Ove Magnussen | | | |
| Petur Heinesen | | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Øssur Jacobsen | 12/0 (0-0) | | B36 |
| Súni Fríði Johannesen | 17/7 (0-0) | 2/0 | GÍ, NSÍ, HB |
| Jóan Petur Poulsen | | | NSÍ |
| Kristian Anton Andreasen | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Dánial Hansen | 12/1 (0-0) | Skála | |
| Súni Fríði Johannesen | 17/7 (0-0) | GÍ | |
| Albert Sævarsson (ÍSL) | | Grindavík | |
| **Frágongd** | | | |
| Messias Perreira (BRA) | 15/0 (2-1) | NSÍ | |
| Arnold Joensen | 17/4 (1-1) | KÍ | |
| Fríðin Ziskason | 12/1 (1-2) | KÍ | |
| John Heri Dam | 18/2 (2-0) | Hvidovre | |
| Anders Nygaard (DAN) | 14/5 (1-0) | B93 | |
| Marlon Jorge (BRA) | 15/0 (4-0) | Brasil | |
| Marcello Marcelino (BRA) | 5/0 (0-0) | Brasil | |
| Michal Kokoszanek (PÓL) | 17/-23 (2-1) | Póland | |
| Morten Skytte (DAN) | 1/0 (0-0) | Danmark | |
| **Venjari** | | | |
| Petur Mohr | | | |



# Jann Ingi er ímyndin av nýggja ættarliðnum

**Ungi miðvallarspælarin hjá B68 byrjaði árið við tveimum venjingardystum á landsliðnum. – Sjálvt um eg havi spælt á fleiri ungdómslandsliðum, gjørdist eg sera bilsin av at verða úttikin, sigur Jann Ingi.**



*– Málið er heilt avgjørt at koma á eitt útlendskt lið. Eg veit, at tað er hart arbeiði, ið skal til, men eg vil fegin royna tað, so tað er bara at spenna seg út og gera nógv við tað, sigur Jann Ingi Petersen.*

Mynd: Álvur Haraldsen

Hilmar Jan Hansen

Føroysku slóðbrotararnir í altjóða landsliðsfótbólti vóru flestallir uttan nakrar sum helst altjóða royndir. Størstu fótbóltsligu avbjóðingarnar høvdu verið onkrir dystir móti Íslandi, og bara onkur hendinga spælari hevði roynt seg í fótbólti uttanlands.

Í so máta er nógv broytt, tí teir ungu spælararnir, sum í dag verða slúsaðir inn á landsliðið, hava so at siga allir royndir frá ungdómslandsliðunum, ið hava havt nógvar uppgávur seinnu árini.

Tí stóð 19 ára gamli B68-arin, Jann Ingi Petersen, ikki á berum og heilt uttan royndir, tá boð vóru eftir honum at koma til venjing á Svangaskarði saman við 24 øðrum spælarum mitt í januar mánaði.

– Eg má tó viðganga, at eg gjørdist sera bilsin, tá eg varð úttikin. Sjálvandi gangi eg og droymi um eitt pláss á landsliðnum, men eg hevði als ikki væntað, at nøkur úttøka skuldi koma upp á tal longu nú, sigur saltnesmaðurin, ið eisini hevur vunnið sær fast pláss á miðvøllinum hjá B68.

– At eg havi verið við øllum landsliðunum, frá U-14 og upp til U-19, kom mær avgjørt til góðar, tí so kendi man eitt sindur til, hvussu hesar venjingarnar ganga fyri seg og hvussu tað er at vera við í einum landsliðshópi.

## Byrjaði inni

Heilt burturvið mundi heldur ikki fótbóltsliga avrikið vera undir venjingunum, ið tilsamans vóru einar tríggjar í tali, tí tá landsliðið mitt í februar skuldi til Malaga í Spania á venjingarlegu, var Jann Ingi við í ferðalagnum.

Har spældi landsliðið ein dyst móti norska Bryne og ein móti einum russiskum liði, og Jann Ingi hevði pláss í byrjunaruppstillingini báðar ferðir.

– Tað var ótrúliga stuttligt at sleppa upp í part har, og at eg so eisini byrjaði inni báðar venjingardystirnar har niðri, var nógv meira, enn eg hevði væntað, sigur Jann Ingi, sum eisini letur væl at teimum eldru og royndaru, ið hann har vandi saman við, og hann kendi seg væl í „selskapinum".

Sum longu nevnt, er landsliðsfótbóltur ikki fremmandur fyri hann, og eitt nú er Jann Ingi liðformaður á U-19-landsliðnum, sum í oktober var í Georgia til EM-undankapping.

Tann eina av dystunum spældu ungu føroyingarnir framman fyri 2.500 áskoðarum, umframt at dysturin varð sendur beinleiðis í georgiska sjónvarpinum. Alt slíkt er við til at mynda og menna ungu spælararnar, so teir eru betur førir fyri at taka við avbjóðingunum, ið koma seinni.

## Royna at vera væl fyri

Avbjóðingarnar tróta heldur ikki hjá Jann Inga Petersen, sum í ár fer undir sítt fjórða kappingarár í 1. deild, um alt verður talt við.

– Tað fyrsta árið spældi eg bara tríggjar dystir, men vildi heldur satsa upp á dreingjaliðið hjá okkum. Hevði eg ikki gjørt tað, hevði eg kanska fingið fleiri dystir, men soleiðis valdi eg at gera, greiðir hann frá.

Síðstu tvey árini hevur tó verið øðrvísi, tí í fyrraárið var Jann Ingi við í trettan dystum og í fjør spældi hann allar uttan ein – og byrjaði inni ellivu av ferðunum.

Fyrireikingarnar til hetta kappingarárið hava verið tær vanligu, men av Toftum frætta vit, at Jann Ingi hevur gjørt rættiliga nógv við at fyrireika seg til fótbóltin í vetur. Sjálvur heldur hann seg ikki gera so nógv meira burturúr enn aðrir:

– Eg havi runnið eitt sindur og vant styrkivenjing saman við hinum. Serliga hava vit yngru spælararnir gjørt nokk so nógv við styrkivenjingina, sigur hann.

– Tá man er ungur, er tað helst eitt sindur lættari at koma í form, men so spældi tað eisini inn, at eg varð innkallaður til landsliðsvenjingarnar her heima og fór við á venjingarleguna í Spania. So mátti eg sjálvandi royna at vera væl fyri.

## Satsa upp á toppin

Hóast tað hevur gingist so sum so hjá B68 teir fyrstu dystirnar í steypakappingini, hevur Jann Ingi góðar vónir um kappingarárið, og hann heldur liðið síggja spennandi út, nú eitt sindur av útskifting er og fleiri ungir spælarar liggja framvið.

– Eg eri øgiliga spentur upp á hetta árið, og eg haldi eisini, at tað er blivið eitt sindur stuttligari at spæla við B68, nú fleiri toftamenn eru við. Sjálvandi eru eisini aðrir við, og eg haldi eitt nú, at Hans Fróði og Dánial Hansen hava riggað væl í miðverjuni hjá okkum, sigur hann.

– Tað er eisini eitt sindur øðrvísi við samanhaldinum og øllum tí, sum er rundan um liðið, tá teir flestu eru føroyingar og kennast væl. Tað verður meira sosialt, og vit hugna okkum meira saman allir, enn vit kanska hava gjørt okkurt annað árið.

Einasti útlendski spælarin, sum er við á liðnum, er íslendski málverjin Albert Sævarsson, men hann er fallin væl til og tykist trívast millum allar hinar hjá B68.

– Sjálvt um byrjanin ikki hevur verið heilt so góð, sum vit kundu hugsað okkum, síggi eg ljóst upp á tað og havi eina vón um, at tað skal eydnast okkum at røkka eitt pláss millum fýra tey fremstu liðini, sigur Jann Ingi, sum ikki heldur hevur fótbóltsevnini frá ongum.

Tveir pápabeiggjar hava verið við í fremstu røð fyri B68, Jógvan Petersen og Ingolf Petersen, sum nú er hjálparvenjari hjá B68.

– Eg havi sjálvandi sæð eitt sindur upp til teir, tí teir vóru á besta B68-liðnum míni barnaár, og tað hevur kanska drivið meg fram, so eg alla tíðina havi havt hug at gera nógv við fótbóltin, sigur hann.

## Vil uttanlands

Ungir spælarar kunnu í dag loyva sær at droyma um at koma víðari, tí møguleikin er at sleppa uttanlands at spæla, og Jann Ingi dylir ikki, at tankin tiltalar hann.

Longu nú hevur hann fingið smakkin av, hvussu tað er at vera við A-landsliðnum, og tí kundi hann hugsað sær meira av, sjálvt um hann sigur seg hava tol at bíða, um boð ikki eru eftir sær hvørja ferð.

– Sum so nógvir aðrir føroyskir fótbóltsspælarar havi eg eitt ynski um at sleppa av landinum, fyri at royna meg á onkrum liði uttanlands. Tá hugsi eg ikki bara um royndarvenjing, sum eg havi roynt í eitt nú enska Derby fyri tveimum árum síðani og  hollendska PSV Eindhoven fyri hálvumtriðja ári síðani, sigur hann.

– Málið er heilt avgjørt at koma á eitt útlendskt lið. Eg veit, at tað er hart arbeiði, ið skal til, men eg vil fegin royna tað, so tað er bara at spenna seg út og gera nógv við tað.

Fyribils er tað so B68, tað heila snýr seg um, og hóast toftamenn ikki hava nakra europeiska uppgávu at síggja fram til í ár, so eru aðrir sýnisgluggar.

Jann Ingi Petersen hevur framvegis aldur til U-19-landsliðið, har hann hevur verið liðskipari - og so kundi tað hent seg, at Henrik Larsen aftur gevur boð…